

## VB/TB meistarar í dreingjadeildini

Við einum 8-1 sigri leygardagin móti AB á Eiðinum í Vági, hevur VB/TB tryggjað sær føroyameistaraheitið, hóast tvey umfør enn eru eftir at leika. Felags dreingjaliðið hjá VB/TB er nú føroyameistari. Hetta er greitt, hóast tvey umfør eru eftir at leika í hesum kappingarárinum. VB/TB tryggjaði sær meistaraheitið í við einum 8-1 sigri á AB, ið vitjaði á Eiðinum í Vági, og nú er greitt, at ongin kann koma framum VB/TB. Hetta er triðja FM-heitið hjá liðnum í fýra ár. Liðið hevur manning úr allari Suðuroynni.

## Sjálvsálit og hugflog

- Tá talan er um eitt botnstríð kemur tú ikki langt við flottum fótbóltsspæli. Tá ræður tað um blóð, sveitta og tár.

Soleiðis segði Stig Tøfting, fyrrverandi danskur landsliðsleikari, í donskum miðlum um vikuskiftið. Men hansara útsøgn varð ikki prógva í Gundadali seinnapartin í gjár.

Tí fótbóltsspælið var – júst sum alt kappingarári – fremst á breddanum hjá B36. Nógv ferð var á bóltinum, einstaklingarnir høvdu hugflog og dirvið og tað var eingin ivi, tá møguleikin var at fáa bóltin framvið Meinhardti Joensen.

B36 spældi við sjálvsáliti og við avrikunum seinastu vikurnar í huga er tað torført at hugsa sær, at liðið ikki luttekur í Vodafonedeildini í 2010.

Runavíkingar komu sera illa frá byrjan, og tað fekk sjálvsagt stóra ávirkan á avrikið. Men teir eiga rós fyri stríðshugan og spæligleðina. Teir fingu einki gult kort, sum prógvar, at teir ikki vóru merktir av álvarsomum frustatiónum. Hóast NSÍ var aftan fyri við fimm málum, og Óli Hansen eftir einum tíma sendi brotsspark framvið málinum, royndu teir at spæla, og tað gav úrslit til seinast – men tvey mál hjálpti ikki tað stóra.

-uni

## Nú restar lítið í

Hóast greiðu leiðsluna, vóru fleiri ferðir boð eftir Jóan Paula Dahl Jakobsen í Gundadali í gjár. Hann stóð seg eftir umstøðunum væl, og var sjálvsagt fegin eftir dystin.

- Serliga í fyrra hálvleiki eru vit omaná. Eftir hvíldina geva vit teimum meira tíð og pláss, men vit eru væl nøgdir, sigur málverjin.

Fyri viku síðan vóru tit undir stórum trýsti í niðurflytingarstríðnum, men vunnu á HB. Mikudagin taptu tit stórt í Streymnesi, og fjarstøðan niður til KÍ á stigatalvuni varð aftur trý stig. Í dag vinna tit stórt móti NSÍ. Skulu tit verða undir trýsti fyri at fáa úrslit?

- Tað kanst tú siga. Men tað er í øllum førum at gleðast um, at vit fáa úrslit, tá vit eru undir trýsti. Men tað er nógv, sum ikki hevur riggað hjá okkum í ár, og í dag gera vit sera fá mistøk, greiðir Jóan Pauli Dahl Jakobsen frá.

Nær verður tað endaliga staðfest, at tit spæla í Vodafonedeildini komandi ár?

- Komandi vikuskifti, tá vit fáa trý stig í Gøtu, sigur Jakobsen.

-uni

## B36-NSÍ 5-2 (3-0):

# Brimgangur í Gundadali

B36

NSÍ

**Brima Koroma vermdi øll B36-hjørtuni í vindinum, regninum og kuldanum í gjár. Hann stóð fyri trimum av teimum fimm málunum hjá árstalsfelagnum, sum vann sannførandi á NSÍ í Gundadali**




Uni Holm Johannesen



B36 var flúgvandi í dystinum móti NSÍ. Her er Odmar Færø í nærdysti við Jan Martin Mortensen

Mynd: Sofus D. Johannesen

Sum svenskur afrikani í brimbardu Føroyum hevur Brima Koroma verið undir stórum trýsti. Fyrst og fremst bara sum útlendingur, sum fjepparnir altíð – og skulu – krevja sær nógv av. Og eftir eina dreymabyrjan við einum máli og tveimum uppleggum á heimavølli móti AB, varð nógv væntað av framherjanum. Men hansara heildaravrik í hesum kappingarárinum hava ikki verið nøktandi.

Men í gjár slóð hann til. Hann var á rættaði staðnum í røttu løtuni. Við trimum málum var hann sum flestu viðleikararnir stórspælandi, tá runavíkingar vóru bukaðir av í høvuðsstaðnum. Og í nógva vindinum og regninum vunnu Koroma og B36 seg eitt fet nærri Vodafonefótbólti í 2010.

### Frálík evni

Brima Koroma hevur fortreytirnar fyri at standa seg væl í føroyskum fótbólti. Hann er skjótur, kropssterkur, ágangandi og frálíkan bóltførleika. Men hann hevur havt tað trupult.

Við gongdini hjá B36 í hesum kappingarárinum í huga, hevur hann ongantíð tikið ábyrgd. Hann hevur sjáldan átt avgerandi týdning í teimum tøttu fótbóltsdystunum, og sum málskjútti hevur hann ikki roynst væl. Tað er serliga framman fyri málinum, at hann hevur havt trupulleikar. Framherjin velur oftast at smekka til úr øllum støðum, har hann ikki hugsar um, hvar á málið bólturin skal.

Men Ahmed Davy Sylla, Alex José dos Santos og Ahmed Keita eru hinvegin dømi um útlendingar, sum skuldu nýta eitt ár at venja seg við føroyska veðurlagið og undirlagið. Og tí er ikki óhugsandi, at Brima Koroma – um hann heldur fram – av álvara fer at gera um seg í 2010.

### Legði bragdliga fyri

Máltalvan í Gundadali vísti bara fýra minuttir í gjár, tá Brima Koroma skeyt sítt fimta mál fyri B36 í hesum kappingarárinum. Og ávaringin var eftir nógvum av døma ikki nóg mikið.

Tí sum einsamallur framherji var Koroma tvær ferðir á blettinum afturat í fyrra hálvleiki. Og tað vísti væl hansara eginleikar. Í tveimum førum fann hann sær pláss handan verjuleikararnar og var tryggur, tá hann royndi seg. Og í seinna málinum rann hann nær um undan fleiri mótstøðumonnum, áðrenn hann økti til 3-0.

Og hóast veðrið í løtum av álvara gjørdi seg inn á áskoðararnar, vermdi hann í øllum førum øll B36-hjørtu.

### Landsliðsleikari

25 ára gamli Brima Koroma er ættaður úr Sierre Leone. Sum yngri varð hann skýrdur eina bjarta fótbóltsframtíð. Hann flutti skjótt til Svøríkis, har hann fekk sítt gjøgnumbrot í 2001. Tá umboðaði hann Essinge IK. Seinni spældi hann við Enkopings SK og Kalmar FF, millum annað í bestu svensku deildini.

Hansara støðugt frálíku avrik gjóvu honum eisini pláss í landsliðshópinum hjá Sierre Leone. Hann hevur umboðað heimlandið tólv ferðir og skotið trý mál. Hansara seinasti landsdystur var í 2006.

### Málini:

**1-0:** Verjan hjá runavíkingum er sera óansin, tá eingin eltir Brima Koroma, sum rann bóltin upp. Framherjin smekkaði til fyrstu ferð, og bólturin sat í handara málhorni. Sera flott mál av framherjanum.
**2-0:** Dennis Holmberg roynir seg við beinleiðis frísparki úr 20 metra fjarstøðu. Meinhardt Joensen roynir at tveita seg upp í málhornið, men ferðin á bólturin er ov nógv. Eitt sera flott mál av danska miðvallaranum.
**3-0:** Brima Koroma rennur frá mótstøðumonnunum og sleppur til baklinjuna í vinstru. Hann er fáar metrar frá málinum, tá hann brádliga roynir seg og onkursvegna fer bólturin fram við málverjanum.
**4-0:** Uppspælið er líkt tí fyrsta. Jákup á Borg lyftir bóltin upp um verjuna hjá gestunum, og Brima Koroma er tryggur, tá hann er einsamallur við málverjan.
**5-0:** Bergur Midjord hevur bæði tíð og pláss, tá frástøðan millum verjupartin og málverjan hjá runavíkingum er ov stór. Midjord verður spældur einsamallur við Meinhardt Joensen, og hann er tryggur.
**5-1:** Innskifti Sjúrður Jacobsen verður málskjútti, tá bólturin brádliga er í netinum handan Jóan Paula Dahl Jakobsen. Jacobsen sendi beinleiðis hornaspark í netið.
**5-2:** Karoly Potemkin er tryggur, tá hann roynir seg úr ellivu metrum.